## HEILSANIR



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við degnum, her liggja vit bleytt og væl. Rakul og Hjarnar ynskja eisini tillukku.
**Mekhala og Jónas**

Øllum tykkum mongu, sum á ymsan hátt gleddu meg á 50 ára degnum, takki eg hjartaliga. Eina serstaka tøkk til tykkum hálvt annað hundrað, sum vitjaðu inn á gólvið í Faksagøtu og gjørdu okkum dagin so óføra festligan og ógloymandi.
**Magnus Pauli**





**Góði Martin**
Hjártaliga tilukku við teimum 30 árunum
**Ynskir Árni**



**Góða Marita**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 15. juni og alt tað besta í framtíðini. Nú mást tú skunda tær.
**Heilsan úr Gomlutrøð**



Hendan prinsessan eitur Katarina og hon fyllir 5 ár í dag. Góðasta Katarina. Hjartaliga tillukku.
**Ynskja omma og abbi**



**Góða Katrina systir**
Hjartaliga tillukku á 5 ára føðingardegnum
**Allarbestu ynskir Kristjan og Anna Sofía**
Eisini muss og klemm frá mammu og babba

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐ Leygard.

Tekstur: ______________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navnið og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ______________________________

Bústaður: ______________________________

Bygd/býur: ____________________ Tlf.: __________

Sendið lepan, vmynd og gjald til:

Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<

# Eldførið á Meiarínum

Barnaleikurin Eldførið, sum Willieboys hava spælt fyri 2600 skúla- og barnagarðsbørnum seinastu mánaðirnar, flytir um vikuskifti inn í Meiaríið

Tað er við spenningi men eisini ávísum sorgblídni, at Willieboys næsta vikuskifti spæla barnaleikin Eldførið í Meiarínum í Havn. Tí umframt at hetta verða fyrstu almennu sýningarnar av ævintýrinum hjá H. C. Andersen, er talan eisini um seinastu sýningarnar av leikinum. Frammanundan hevur leikurin verið spældur óalment á skúlum og barnagarðum kring landið.

Nú er skúlaárið komið so langt, at leikbólkurin metti, at nú var tíð at gevast. Tó hava teir báðir leikararnir, Finnur Jensen og Bárður Persson, allatíðina ætlað, at enda við tveimum almennum sýningum, so børn og vaksin, ið ikki fingu møguleikan at síggja leikin, ella bara tey, ið gjarna vildu síggja hann umaftur, skuldu fáa møguleikan.

### Ein familjuleikur

Eldførið, ið er ein nútíðar skemtilig útgáva av uppruna ævintýrinum hjá H. C. Andersen, hevur verið víða um í Føroyum. Leikurin, ið Elin á Rógvi hevur leikstjórnað, er framførdur 25 ferðir á dagstovnum og skúlum í Streymoynni, Eysturoynni, Sandoynni og í Suðuroynni. Umleið 2600 børn hava sæð leikin - fyri ikki at tosa um lærararnir og pedagogarnir, sum í nógvum førum tyktust flenna harðari enn børnini. Leikurin hevur nevniliga eina rættiliga breiða áskoðarafjøld - frá teimum yngstu barnagarðsbørnunum til tey heilt tilkomnu.

Atgongumerki til báðar sýningar, ið vera í Meiarínum leygardag og sunnudag klokkan 16, fáast annars í Kunningarstovuni í Havn og við dyrnar ein tíma undan sýning.

**ave**

# Forelskaður sjónleikari á G!

Páll Finnur Páll verða við á G! Festivalinum. Bólkurin luttók á seinasta G! Festivali, og hevur síðan tá innspælt eina nýggja fløgu, sum í løtuni verður ljóðblandað. Bæði Jón Tyril fyriskipari og Finnur Jensen sangari og gittarleikari í bólkinum vátta fyri Sosialinum, at teir luttaka.

Páll Finnur Páll hava skrivað størstu landaplágguna í nýggjari tíð í føroyskum tónleiki. Lagið "Forelskaður sjónleikari" lá í samfullar 50 vikur á 15 teimum bestu, og harav 10 á ovastu rók. Hetta er fullkomiliga óhoyrt, og er hvørki hent áður ella aftan á.

Her er talan um ein av Føroya bestu livebólkum, teir er orkumiklir og sannførandi og duga at fáa fólkið við. Lættu løgini, og vælskrivaðu tekstirnir hjá Finni eru framúr, fólk festa seg beinanvegin við tónleikin og orðini. Páll Oddur skrivar eisini fantastisk løg, men teir sera argandi tekstirnir styggja eitt sindur.

Á nýggju fløguni hjá bólkinum eru fleiri løg, sum kunnu gerast nýggjar landaplágur, meðan okkurt lag er í sama argandi stíli, sum eyðkendi partar av fyrru fløguni.

**nud**